

# Andstøðan vil lata oljuna liggja

Deil:

**Jan Müller**

21.07.2014 - 18:20

Oljan.fo

Sosialdemokratarnir í Noregi, sum nú eru í andstøðu í Stórtinginum, halda tað vera ov skaðiligt fyri veðurlagið at taka alla oljuna upp úr undirgrundini.

Fíggjarliga kann Noreg uttan iva loyva sær at lata oljuna liggja, tí tann oljan, sum er komin upp, hevur longu tryggjað komandi ættarliðum ovmikið av lummapengum. Fyri nøkrum vikum síðani bleiv kunngjørt, at 890 milliardir dollarar eru í tí almenna oljugrunninum, skrivar e24.

Norðmenn hava nógva olju eftir í undirgrundini, men nú siga sosialdemokratarnir, at tað er ikki vist, at tað er so skilagott at taka hana upp. Flokkurin sigur, at tann seinasta oljan í einum brunni er tann mest skaðiliga fyri veðurlagið at taka upp, og at tað tí kann beina

fyri tí norska málsetninginum á veðurlagsøkinum, um tann seinasta oljan í hvørjum brunni verður tikin upp.

-Vit kunnu ikki venda tað blinda eygað til, tá ST sigur, at tað er neyðugt at lata tveir triðingar av allari funnari olju verða verandi í undirgrundini, um vit skulu forða fyri, at hitin veksur meiri enn tvey stig, sigur Marianna Marthinsen við e24. Hon er sosialdemokratisk talskvinna í fíggjarmálum.

Noreg hevur bundið seg til at halda málið hjá ST um at gera sítt til, at hitin ikki veksur meiri enn tvey stig.

Norsku politikararnir viðgera landsins oljupolitikk fjórða hvørt ár. Tað merkir, at sosialdemokararnir eiga ein stóran part av verandi politikki, sum bleiv lagdur, tá teir sótu við stjórnarvaldinum